# Drúgvur flogbóltsfundur

Flogbóltssambandið kom ikki á mál, tá teir høvdu aðalfund leygardagin. Fundurin byrjaði kl. 10 fyrrapartin, men klokkan 15 var framvegis ikki komið heilt á mál, og tískil varð avgerð tikin um at niðurleggja fundin. Nýggjur fundur verður annan leygardagin, og tá verður bara eitt mál á skránni.

Talan er um formansvalið, og sum so man hetta ikki koma sum nakar skelkur. Longu fyri tveimum árum síðani boðaði Niclas Joensen frá, at hann ikki ætlaði sær at halda fram í formanssessinum, men eftir drúgva umhugsunartíð játtaði hann tó at taka tvey ár afturat.

Hesaferð hevr hann tó gjørt greitt, at hann tekur ikki við afturvali, og tí skal nýggjur formaður finnast á framhaldandi aðalfundinum.

### Kostnaðarmikið menn gott

Tað var annars ein væl nøgdur formaður, sum legði sína frágreiðing fram leygardagin.

Hóast roknskapurin fyri fyrstu ferð í fleiri ár sýndi eitt hall, og var hetta 333 tkr. Eginognin hjá FBF er tó framvegis positiv við 259 tkr.

Hinvegin er einki at taka seg aftur í, at árið í fjør hevur verið eitt hitt rúgvusmiklasta nakrantíð, tá tosað verður um aktivitetir hjá Flogbóltssambandinum.

Og formaðurin fegnaðist um úrslitini, sum hetta hevði givið. Ikki minst gull- og silvurmerkini á Oyggjaleikunum, eins og menninir leiktu seg víðari úr sínum undankappingarbólki, tá teir í heyst vóru í Skotlandi.

Annars legði formaðurin stóran dent á, at ein langtíðarælan eigur at verða gjørd fyri landsliðsarbeiðið. Bæði við menning av yngru leikarum og fíggjarstøðuni sum heild fyri eyga.

**-jm**



*Nógv fólk var á ÍSF-fundinum fríggjakvøldið*

# Sjálvbodnu kreftirnar eiga heilt einfalt lívið í ítróttini

**Landsmyndugleikarnir ynskja at gagnnýta dynamikkin í ítróttini, men minnast skal til, at tað er eingin sjálvfylgja, at ítróttarvenjingar og -kappingar verða fyriskipaðar. M.a. hetta kom fram tá Ítróttasamband Føroya hevði aðalfund fríggjakvøldið**

ÍSF-AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Tað er at fegnast um, at ítróttur og rørsla tykjast gerast ein alt størri partur av gerandisdegnum hjá hvørjum einstakum føroyingi. Bæði hjá teimum, ið sjálvi íðka ítrótt, ella eru við í tí stóra sjálvbodna arbeiðinum, ið verður gjørt innan ítróttin kring landið. Ítróttarørslan er ein sonn fólkarørsla. At eitt so lítið samfelag sum tað føroyska skal hava so nógv ítróttarligt virksemi er ivaleyst eindømi, men virksemið er tó treytað av, at einstaklingar kring landið taka uppgávurnar í einum ítróttafelagi uppá seg. Sjálvbodnu kreftirnar eiga heilt einfalt lívið í ítróttini, segði Heðin Mortensen í frágreiðing síni til aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya fríggjakvøldið.

Víðari segði hann, at ÍSF hevði lagt til merkis, at landsmyndugleikarnir geva ítróttini størri ans. Hetta skilt á tann hátt, at teir í øktan mun ynskja at gagnnýta dynamikkin í ítróttini, og ta betringina av fólkaheilsuni, ið ítróttin gevur ungum og gomlum kring landið. Ítróttarørslan fegnast sjálvsagt um, at alt fleiri fáa eyguni upp fyri ítróttini, men samstundis má gerast vart við, at umhvørvið í sjálvbodnu ítróttarørsluni er minst líka viðkvæmt sum umhvørvið í náttúruni. Tað er eingin sjálvfylgja, at ítróttarvenjingar og -kappingar verða fyriskipaðar. Tað er eingin sjálvfylgja, at ítróttin hevur amboð og verkløg. Og tað er eingin sjálvfylgja, at feløg og landslið eru í fremstu røð í marknaðarføringini av Føroyum uttanlands. Hetta viðkvæma sjálvbodna umhvørvið innan ítróttin tolir ikki, at eitt nú landsmyndugleikar vilja eyðræna tað, fyri at fáa nógv burturúr fyri lítið.

Tað er av alstórum týdningi, at allir myndugleikar standa saman um at verja sjálvbodnu ítróttarørsluna. Tann týdningur, sum hon hevur fyri samfelagið sosialt og heilsuliga, kann ikki gerast upp í krónum og oyrum. Samstundis ber ikki til at keypa seg til ta orku og tann eldhug, ið verður lagt í tað sjálvbodna arbeiðið.

Onkur hevur tikið til, at sjálvboðið arbeiðið er tað, ið vit ikki høvdu gjørt, um vit fingu løn fyri tað. Og soleiðis er tað mangan. Gleðin í ítróttarligum arbeiði kemst av at síggja fólk venja og kappast, segði ÍSF-forsetin.

### Ítróttaálit

Seinasta summar setti táverandi landstýrismaður í mentamálum ein arbeiðsbólk við tveimum umboðum fyri ÍSF og einum umboði fyri Mentamálaráðið, ið skuldi arbeiða við at orða eitt ítróttaálit. Arbeiðið er drúgt, eftirsum brótast skal upp úr nýggjum. ÍSF og sersambondini hava verið aktivur partur av arbeiðinum við álitinum. Hetta er samstundis gott høvi til sjálvrannsakan hjá einstøku ítróttargreinunum. ÍSF vónar at nýggja landsstýrið framhaldandi fer at stuðla hesum týðandi arbeiði, sum er farið í gongd.

ÍSF fegnast tó um, at Heilsumálaráðið er í ferð við at gera eina føroyska dopinglóggávu, so herferðin móti ólógligum stimbrandi evnum gerst uppaftur betri.

Í strembanini eftir at betra um fólkaheilsuna hevur ÍSF fyrr heitt á landsmyndugleikarnar at gera eitt serligt »rørsluár", eins og roynt hevur verið í onkrum av grannalondunum. ÍSF er til reiðar at fara til verka, men hóast nógv verður tosað um fólkaheilsu, so hava almennu myndugleikarnir ikki enn vilja tikið ábyrgd av hesum tiltaki.

Í samband við útlendingamálið gjørdi forsetin vart við, at ÍSF var hart móti uppskotinum um at feløgini skuldu rinda útlendsku ítróttafólkunum so stóra løn, at hesi verða starvssett av feløgunum burturav. Partvís megna feløgini ikki at gjalda slíkar upphæddir. Samstundis hevur tað altíð verið eitt eyðkenni fyri føroyska ítrótt, at fólk íðka og skipa fyri kappingum av áhuga. Hetta er júst styrkin við ítróttini.

Um landsmyndugleikarnir seta ynski fram um eina professionalisering av ítróttini, so leggja teir eftir sjálvum grundarlagnum undir teimum meiri enn 100 ítróttarfeløgunum kring landið. Um ítróttin skal professionaliserast, má tað vera eftir ynski frá ítróttini sjálvari. Hetta skal ikki gerast fyri at lætta um umsitingina hjá landsmyndugleikunum.

Ítróttasamband Føroya hevur endurnýggjað umsóknina um olympiskan limaskap. Umsóknin er í løtuni til viðgerðar hjá IOC. Bíðað verður í spenningi eftir, um Føroyar verða upptiknar sum limur í felagsskapinum. Yvirhøvur skilja evropeisku londini sjálvstøðugu støðuna hjá Føroyum. Men IOC er ein stórur felagsskapur við nógvum ymsum áhugamálum, og tí er ilt at meta um, hvørt tað fer at eydnast at fáa olympiskan limaskap á hesum sinni.

### Dopingroyndir

Dopingeftirlitið hjá ÍSF er komið í eina fasta legu. Í 2003 vóru íalt 21 kanningar gjørdar. Higartil eru kanningar gjørdar av ítróttafólkum innan flest allar ítróttagreinar og øll úrslitini hava tíbetur verið negativ. Føroyska dopingeftirlitið fylgir reglunum hjá altjóða antidopingfelagsskapinum WADA. Royndirnar, ið vórðu tiknar í 2003 vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Borðtennis | 1 |
| Fimleikur | 3 |
| Flogbóltur | 5 |
| Frælsur Ítróttur | 2 |
| Hondbólt | 8 |
| Kappróður | 2 |

Á aðalfundinum var eisini val av nevnd á skránni. Fyri vali stóð forsetin Heðin Mortensen og varð hann einmælt afturvaldur uttan mótvalevni og fer nú sostatt í holt við 25. starvsár sítt sum ovasti leiðari hjá føroysku ítróttarørsluni. Eisini stóð varalimurin í starvsnevndini, John Kjær, fyri vali og varð hann eisini einmælt afturvaldur.



HB-B68 7-1 (4-0):

# Einvegis ferðsla í Gundadali

**Tað var stórur munur á liðunum báðum, tá ið HB og B68 hittust í Gundadali leygardagin. Havnarliðið hevði yvirvág allan dyst, og toftamenn vóru ógvuliga sjáldsamir gestir í brotsteiginum hjá HB**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Undan dystinum leygardagin fekk liðskiparin hjá HB, Rùni Nolsøe, handaðar blómur, tí at hann leikti sín dyst nummar 300 á besta liðnum hjá føroyameistarunum. Harvið hevur Rúni dystarmet í havnarfelagnum, og tað er einki minni enn eitt bragd, tá ið havt verður í huga, at Rúni spældi fleiri ár á besta liðnum hjá barndómsfelagnum VB, áðrenn hann skifti til HB.



*Heðin á Lakjuni var hesaferð í vinstra borðið, og kviki klaksvíkingurin tóktist stórtrívast í leiklutinum*

### Skotvenjing

Beint tá ið dysturin varð settur í gongd, bleiv ein langur bóltur sparkaður fram móti málteiginum hjá HB, men verjan hjá heimaliðnum fekk blokerað skotroyndini. Hetta vísti seg at vera einastu ferð, at toftamenn vóru á vitjan framman fyri málinum hjá HB-málverjanum, Pól Næss Joensen, í fyrra hálvleiki, meðan starvsfelagi hansara í hinum endanum, Mortan Hansen, hevði úr at gera.

Álopini skolaðu oman móti málinum hjá B68, og serliga var tað vinstra síða hjá HB við Heðini á Lakjuni á odda, sum var ein støðug hóttan. Toftamenn hinvegin fingu einki at hanga saman hjá sær, og teir báðir miðverjarnir hjá B68 Jákup Eli Olsen og Herbert í Lon Jacobsen vóru alt ov ofta svíktir av miðvøllinum, tá ið HB fór í álop.

Áskoðarafjøldin, sum ikki var serliga stór, sat bara og bíðaði eftir fyrsta málinum til heimaliðið, og tað kom, tá ið eitt gott korter var leikt. Ein langur bóltur verður sendur úr verjuni hjá HB niðan í álopið, og á brotsteigarmarkinum leggur Heine Fernandez bóltin við bringuni niður fyri føturnar á Rógva Jacobsen, sum langar bóltin í kassan til 1-0. Bert fáa minuttir seinni var býtt um upp á leiklutirnar, tí tá legði Rógvi ein bóltur inn fyri úr vinstru, sum Heine sendi í netið til 2-0. Sjey minuttir seinni gjørdist tað 3-0, tá ið besti maður á vøllinum, Kári Nielsen, sendi eitt brakandi langskot úr 30 metrum í mál. Smáar tíggju minuttir fyri hálvleik kom so hæddarpunktið hjá HB-leikarunum, tí tá skeyt Janus Joensen eitt langskot, sum snittaði ein toftamann, í mál, og hetta var fyrsta málið hjá Janusi í hansara 103 dystum á besta liðnum hjá HB.

Hálvleiksstøðan var 4-0 til HB, og hetta var ikki eitt mál ov lítið, tí talan hevði allar 45 minuttirnar verið um spæl upp á eitt mál. B68 hevði als einki víst, og tað man verða langt síðani, at eitt so tamt lið av Toftum hevur verið á vitjan í Gundadali.

### Tamur seinni hálvleikur

Eftir steðgin lækkaði leikferðin munandi. Tað sást týðuliga, at heimaliðið fyrst og fremst hugsaði um at sleppa undan skaðum og leikbannum til komandi landskappingardyst, sum verður ímóti arvafíggindunum úr B36 komandi sunnudag. Av somu orsøk slapp B68 eisini at flyta seg eitt sindur longur fram á vøllin, og tá ið eitt lítið korter var leikt av seinna hálvleiki fingu teir pyntað um støðuna. Eitt mistak í verjuni hjá HB førdi við sær, at liðskiparin hjá B68, Øssur Hansen, slapp leysur, og tá ið Pól kom út ímóti honum, lobbaði Øssur bóltin hegnisliga upp um Pól og í málið.

Hetta gav tó ikki nakran spenning í dystin, og longu tveir minuttir seinni økti HB aftur. Eftir eitt hornaspark var dømt fyri brotssparki til heimaliðið, hóast tað var eitt sindur trupult at fáa eyga á av áskoðaraplássunum, og tað sendi Vagnur Mortensen trygt í mál. Føroyameistararnir fingu tvinni mál afturat í dystinum, sum Rókur Jespersen og Heine Fernandez skoraðu.

Eftir dystin kann staðfestast, at B68 av álvara líkist einum niðurflytara, tí tað er sera trupult at fáa eyga á, hvussu teir kunnu bjarga sær tey neyðugu stigini í bestu deildini. Stóra útskiftingin í hópinum í ár í mun til í fjør er ógvuliga sjónlig, og missurin av leikarum sum Fróða Benjaminsen, Hans Fróða Hansen, Jann Inga Petersen og John Hera Dam er helst ov stórur, serliga tá ið havt verður í huga, at tað ikki hevur eydnast at útvega eins sterkar avloysarar. Serliga er tað á miðvøllinum, at saknurin er stórur í Fróða og Jann Inga, og tað er kanska eitt sindur undrunarvert, at veteranurin Øssur Hansen er fluttur av sínum vanliga plássi á miðvøllinum niðan í álopið, tá ið nú manningin á miðjuni er so tunn.

HB tykist hinvegin at verða komið fyri seg eftir trilvandi byrjanina upp á kappingarárið, og liðið sær út til at gerast sterkari fyri hvønn dyst, sum fer aftur um bak. Hvussu sterkir teir í veruleikanum eru, fæst óivað greiði á, tá ið teir komandi sunnudagin skulu spæla grannauppgerð ímóti B36.

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-B68 7-1 (4-0)**
1-0 Rógvi Jacobsen 15.
2-0 Heine Fernandez 21.
3-0 Kári Nielsen 28.
4-0 Janus M. Joensen 36.
4-1 Øssur Hansen 59.
5-1 Vagnur M. Mortensen 61. brts.
6-1 Rókur av Fløtum Jespersen
7-1 Heine Fernandez
**HB:** Pól Næss Joensen, Janus M. Joensen, Símun Eliasen, Vagnur M. Mortensen, Hallur Danielsen, Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Rókur Jespersen, Heðin á Lakjuni, Rógvi Jacobsen, Heine Fernandez
**B68:** Mortan Hansen, Herbert í Lon Jacobsen, Jákup Eli Olsen, Oleif Joensen, Ovi Magnussen, Øssur Hansen, Stanislav Stankov, Jóhan Petur Poulsen (65. Óli Olsen), Kári Sigvardsen, Bogi Petersen, Kristian Anthon Andreassen (Eyðstein Skipanes)
**Gult kort:** Janus M. Joensen, Ovi Magnussen
**Dómari:** Eiler Rasmussen

# Nú gongur rætta vegin

HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, leikti leygardagin dagin sín dyst nummar 300 í reyðu og svørtu strípunum og setti harvið met í havarfelagnum

Rúni Nolsøe sigur, at dysturin leygardagin var eitt prógv um, at nú gongur rætta vegin hjá føroyameistarunum, og hann fegnast um, at glið tykist verða komið á spælið hjá HB. Tó heldur Rúni, at liðið hjá B68, sum teir spældu ímóti leygardagin, er tað veikasta B68-liðið, ið hann nakrantíð hevur leikt ímóti, síðani hann fyrstu ferð spældi í bestu deildini.

Spurdur um dysturin komandi sunnudag fer at vísa, hvussu sterkt HB-liðið í veruleikanum er, sigur Rúni Nolsøe, at tað er møguligt, men eftir hansara tykki eru øll liðini javnt góð í ár, og tað tykist sum um, at øll kunnu taka stig frá øllum.

– Ongin dystur kann tippast frammanundan, og tað ger tað bara nógv stuttligari, sigur Rúni Nolsøe.



Liðskiparin hjá HB, sum í ár leikar sítt 12. kappingarár í havnarfelagnum, sigur tað verða stuttligt at eiga dystarmetið í havnarfelagnum, men annars hevur tað ikki so nógv at siga, heldur Rúni Nolsøe. Áðrenn Rúni fór at leika við HB, leikti hann fimm kappingarár á besta liðnum hjá barndómsfelagnum VB, so dystirnir hjá honum í fremstu deildini eru heilt nógvir. Rúni Nolsøe hevur eisini sáttmála við HB komandi kappingarár, men í løtuni tekur hann tó eitt ár í senn, tí nú eru tey mongu fótbóltsárini farin at merkjast á kroppinum. Tó sigur Rúni, at hann kennir seg sum HBara, og at hann fer at spæla í reyðu og svørtu strípunum, til hann gevst við fótbóltinum.

**-tn**